Kræsin grafisk list

Framsýningin hjá Mariusi Olsen í Snarskivuni

Ymisk viðurskiftir hava tey seinastu tjúgu árini havt við sær, at vit borgarar eru farnir at loypa virkir, stovnar og skrivstovur um, sum fyrr hava tænt okkum trúliga. Sum dømi um hetta rák kann ein loyva sær at spyrja, hvussu leingi aftrat vit fara at brúka ein stovn sum posthúsið. Okkara samskifti við vinfólk og myndugleikar fer fram á talgildan hátt, og glaðað verður beinleiðis frá teldu til teldu. Skuldu vit havt brúk fyri samskifti av tí gamla slagnum, hava mong okkara frímerkir, brævbjálvar og pakkar á goymslu - umframt løntar tænarar, sum kunnu gera okkara sneisaørindir fyri okkum.

So óbøtilig - og á mangan hátt hent - henda gongd er, hevur hon onkra óhepna avleiðing. Sjón gekk fyri søgn, um ein fyri jól hevði ørindir á tí gamla posthúsinum í Havn ella á býarskrivstovuni, sum heldur til í sama høli. Innkomin varnaðist ein, at hesir báðir annars heldur turrisligu og embætiskendu stovnar brádligu hildu til í leskiligum listarligum umhvørvi. Tann skundmikli bræv- ella pakkaberin steðgaði á og gloymdi seg burtur framman fyri tí framsýning, sum her hekk uppi.

Tað er listamaðurin Marius Olsen, sum í desember mánaði hevur sýnt fram í Snarskivuni. Tey evnir, hann hevur valt at nærkast við síni grafisku list, eru øll á onkran hátt tengd at natúrini - stemningar, lýsi, morgun, kvøld, kavi, taraflúrur, ælabogi.

Yvir listini hjá Mariusi Olsen er ein - í orðsins bestu merking - skroypiligur farri. Annaðhvørt talan er um steinprent, træprent, linoprent ella mezzotinta, er yvir Mariusar striku ein varhugi av fínleika, ein blúgv nærkan. Evnisliga eru hansara myndir úrslit av eini eygleiðing, sum sprettur úr frástøðu og einsemi. Eingin varmi er í hesum prentum, eingin felagskensla. Í summum teirra hómast eitt andlit ella bara umgerðin av einum andliti, sum kemur til sjóndar í einum bleikum glugga ella aftan fyri eina gardinu. Kanska eru hesi bæði, tann tematiska frástøðan og tann leitandi strikan, partar av fyritreytini fyri, at listarmaðurin viðhvørt megnar at fanga løtunnar hvørvnu leiftran, og í onkrum føri hennara titrandi, epifaniska vakurleika.

Kanska kann verða sagt um Mariusar grafisku list, at tann teigur, hann hevur funnið sær at dyrka, er smalur, men at hann samstundis hevur ment henda geira, so at hansara ávøkstur hevur ein meira persónligan dám enn hjá teimum flestu. Innan fyri sítt serliga øki hevur hann vunnið ein ávísan meistaraskap. Tey mongu, bæði vanligir borgarar og umboð fyri fjølmiðlar, sum hava lyndi til tíðliga og seint at renna aftan á tí eina, kenda bóltinum, gáa ivaleyst ikki um slíka list. Sannleikin er helst, at kræsin listarlig andkoma av hesum slag boðar frá, at ein tjóð so smátt er farin at "ganga framvið".

Tá ið hetta er sagt, kann kanska vera loyvt at føra fram, at handalag og teknikkur hjá hesum listarmanni kundu havt gagn av at roynt seg á einum heldur rúmari øki ella við spølnari tematiskum snaringum. Einki tykist at forða fyri, at grafikkur av hesum slag kundi slept tí realistiska bátstognum. Eisini rennur tí hyggjandi í huga, at Marius Olsen fyrr hevur roynt seg við nøkrum, ið minnir um sálarlýsing. Hesi bæði brigdini, surrealisma og sálarlýsing, kundu kanska givið Mariusar vandnu, eitt sindur idiosynkratisku grafisku striku eina tilfarsøking, sum kundi ment hana meira, og ein trídimensionalitet, sum hon vissuliga hevði megnað at lyft.

Hyggjarin handar postverksins brosandi drósi sínar jólapakkar, fer út aftur, men heldur seg ikki vera tómhentan. Tinganestið, hann ber við sær, er helst tað, sum tann orðhaga nútíðin rópar eitt synergiíkast.

Hanus Kamban

Jenis av Rana fimmti

Í dag verður Jenis av Rana, tingmaður fyri Miðflokkin, fimmti ár. Hann er føddur 7. januar í 1953 í Trongisvági. Hann er sonur Aslaug og Dánjal av Rana, og hann er giftur Annu, fødd Absalonsen.

Jensi av Rana hevur sitið á tingi síðani valið í juli 1994, tá hann varð valdur á ting fyri nýstovnaða Miðflokkin – saman við Tordi Niclasen. Miðflokkurin hevði sín uppruna í Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki, sum aftur hevði sín uppruna í Framburðsflokkinum hjá Kjartan Mohr. Við valini í 1998 og í 2002 varð Jenis einsamallur valdur á ting fyri Miðflokkin, sum nú er partur av samgonguni, og hevur flokkurin fyri fyrstu ferð fingið landsstýrissess.

Jenis er útbúgvin lækni í 1983. Áðrenn lesturin starvaðist hann sum læraravikarur á Tvøroyri og í Froðba árini 1972-74. Síðani 1983 hevur hann starvast sum lækni – síðani 1995 sum kommunulækni í Havn.

Í politikki er Jenis serliga kendur fyri síni avgjørdu sjónarmið, sum eru bygd á átrúnaðarliga hugsjón. Hann er eisini kendur prædikumaður og er hann av høvuðsmonnunum aftan fyri kristilligu útvarpsstøðina, Lindina.

Jenis av Rana hevur eisini havt sæti í Tórshavnar býráð fyri Uttanflokkalistan frá 1993-96, tá hann hevði sæti sum varamaður fyri Petur í Gong.

Kunngjørt verður at

Thurid Thomasen
vanliga nevnd Bulle, Tórshavn

andaðist í heiminum sunnudagin 5. januar
73 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
mikudagin kl. 13.00.
Sálmabókin verður brúkt.

Vegna tey avvarðandi

Karten

Tey, ið vilja lata blómur ella krans kunnu í staðin lata eina gávu til Føroya Felag móti Krabbameini.

Greta Hansen 85 ár

Í dag, týsdagin 7. januar, fyllir Margretha Hansen á Roykheyggi í Saltnesi 85 ár. Føðingardagin heldur hon hjá dóttrini, sum býr í grannalagnum. Greta er ættað úr Leirvík. Foreldrini vóru Josefina og Elias Eliassen. Barnaheimið var á Toftanesi. Søgurnar og lagnurnar hjá mongum, sum settu búgv í Føroyum fyri hundrað árum síðani ella so, vóru ofta eyðkendar av sjúku og deyða, sum stóðust av sovornum, sum nú á døgum als ikki nýtist at vera orsøk til deyða. Familjan hjá Gretu er einki undantak í so máta.

Pápin doyði av lungnabruna, tá ið Greta var lítil smágenta. Josefina sat eftir við fimm børnum, og okkurt eldri fólkið var eisini í húsinum. Sjálvandi var tað stríggið, men tey komu undan.

Kristian Karl var elstur av børnunum. Hann búsettist í Runavík, men hann doyði longu sum 33 ára gamal av blindtarmsbruna. Jógvan Elias yvirtók barnaheimið á Toftanesi. Hansina og Lina giftust við útróðrarmonnum í Leirvík – ávikavíst Ingvardi Joensen og Peturi á Regni.

Greta giftist í 1951 við Eliesari Hansen á Roykheyggi. Sum navnið sigur, so var hann av Roykheyggi. Tá ið Eliesar var átta ára gamalur, misti hann pápan, sum doyði av lungnabruna. Hann fór tá til Leirvíkar, har hann var hjá einari mostur, inntil hann var 16 ára gamal. Tá kom hann út aftur á Roykheyggj, og tað var har hann og Greta bygdu.

Eliesar var skipsmaður øll síni bestu ár. Hann sigldi eitt nú við Mjóvanesi, Høganesi og Vesturvík, og síðsta skipið, sum hann var við, áðrenn hann í 1980 legðist uppi, var Jógvan Norðri. Millum skipararnar, sum Eliesar sigldi við, vóru beiggin, Dia á Roykheyggi, og bróðursonurin Petur á Roykheyggi. Eliesar átti maskinbátin Roykheyggj, og í 1959 var hann saman við trimum øðrum í Holsteinsborg og róði út. Tá ið Eliesar gavst á sjónum, var hann 64 ára gamal. Hann doyði 12. apríl í 1995, og tá hevði hann í fleiri enn tíggju ár sitið á Ellisheiminum í Runavík.

Greta og Eliesar fingu tvær døtrar. Helena býr í Havnini, og Eyðhild býr dygst innanfyri Roykheygg.

Sum hjá flestu øðrum fiskimannakonum var luturin hjá Gretu at vera heima hjá børnunum. Eftir at flakavirkið Nykur var komið á Toftum, fóru fleiri av tilkomnu konunum á plássinum at arbeiða í fiski. Í mai í 1976 fór Greta at arbeiða á Nyki, og har var hon inntil í 1991. Henni dámdi sera væl at arbeiða á Nyki.

Hóast hon í dag fyllir 85 ár, so er Greta frísk og ferug. Hon hevur gott skil, og hon fylgir væl við. Alla sína tíð vóru Greta og Eliesar trúføst í salinum á Toftum. Greta kemur framvegis regluliga í salin. Eftir eitt langt lív gleðist hon í vónini um, at tað besta er fyri framman hjá øllum teimum, sum hava sett sítt álit á Harran Jesus.

Vit ynskja Gretu hjartaliga tillukku og heilsa henni og hennara á stóra degnum í dag.

J. Hansen